


# SENDIRITARI TIL SENDISTOVU FØROYA Í REYKJAVÍK

Søkt verður eftir sendiritara til sendistovu Føroya í Reykjavík at seta 1. september.

**Uppgávur**
Starvið fevnir millum annað um:
- Málsviðgerð
- Telefonmóttøku
- Taka ímóti viðskiftafólki
- Skjalaskráseting
- Brævasamskifti
- Røkja heimasíðuna
- Umseting

Roknast kann við at málsviðgerð og skrivstovuarbeiði verður helvt um helvt.

**Førleikakrøv**
Vit ynskja at tú hevur áræði og røttu førleikarnar at røkja nevndu uppgávur. Talan kann t.d. vera um 2 -3 ára teoretiska útbúgving og viðkomandi royndir. Dentur verður lagdur á góðan málkunnleika í føroyskum, enskum og íslendskum bæði í skrift og talu. Umsøkjarar eiga at hava góð samstarvsevnir, vera áhitnir, miðvísir, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar.

**Starvsstaðið**
Starvsstaðið verður sendistova Føroya í Reykjavík, Austurstræti 12. Sendistovan er skipanarliga samrunnin partur av Uttanríkisdeildini á Løgmansskrivstovuni.

**Setanartreytir**
Starvið er fulltíðarstarv og er skipað samsvarandi teim reglum, sum eru galdandi í donsku uttanríkistænastuni fyri starvsfólk sett á staðnum. Bústaðarviðurskifti eru ábyrgd umsøkjarans.

Gjøllari upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Gunvør Balle, á telefon 35 10 23/551023.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, lívrensli (CV) og viðmælum verða at senda:

Løgmansskrivstovan
Tinganes
FO-100 Tórshavn
ella
Teldupostur info@tinganes.fo
og vera Løgmansskrivstovuni í hendi í seinasta lagi mánadagin 20. august 2007.

---

Løgmansskrivstovan styðjar løgmanni í at stjórna landsstýrinum og hevur ábyrgdina av at fyrireika og fremja uppgávurnar, sum løgmaður hevur sambært stýrisskipanini, nevniliga at samskipa og hava eftirlit við landsstýrinum, umframt fyrisiting og uttanríkismál

VIT DRAGA EINA LÍNU · VIT SETA SKYNSEMI Í HÁSÆTI · VIT VILJA VITA · VIT BRÓTA SLÓÐ

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

---

Keypssamtøkan í Fuglafirði

FK í Fuglafirði sóknast eftir

# Hjálparfólki

við vanligum koyrikorti at byrja skjótast.

Arbeiðstíðin verður 40 tímar um vikuna.

Arbeiðið verður partvís í handlinum, partvís í goymsluni, umframt koyring.

Løn:
Sambært sáttmálan við S & K

Nærri fæst at vita við at venda sær til Hansinu Abrahamsen, tel 217095

Skrivlig umsókn skal, innan 11. august, sendast til

FK Fuglafjørður
Toftavegi 12
FO 530 Fuglafirði
att: Hansina Abrahamsen

fk

---

DEKKMASTER.FO

...tá ið prísurin eisini er avgerandi!

# Ger teg kláran til bilferðina



einans 2.590,-

## Aytobe PG-63509 GPS

Aytobe GPS við fullfíggjaðum korti yvir Vestureuropa fyri super-prís. Alt er Plug and Play.

**Hevur m.a:**
- 3,5" Samsung Touch LCD skerm
- Fjarstýring
- 20 mál
- 3D/2D vísing av korti
- Innbygdan MP3 spælara
- Dag/nátt ljós
- Intel PAX 255 300 MHz processor
- 64 MB innbygt minni
- Innbygdan SD kortlesara
- Lithium battarí (3 tímar)

---

*Góður matur í hugnaligum umhvørvi*



*Góður matur*

*Stílfullur hugni ...*

*... í hjartanum í býnum*

*Avgjørt vert at vitja*

*Opið frá kl. 17.00*

*Bílegg borð á 214121*

RESTAURANT MERLOT

*Vælkomin*

Sjónband 317774

Magnus Heinasonargøta 20
FO-100 Tórshavn
Tel (+298) 311121 - Mobile (+298) 214121